

Fangar í leinkjum

Her verða brøv lisin frá Walbaum og Steel, sum boða frá, at teir vilja loysast úr starvi, skuldi Danielson komið aftur til maskindeildina hjá missiónini.

Tað varð samtykt, at tað besta vildi verið, at mælt Dollanum til at senda inn eina uppsøgn.

Á hesum fundi varð eisini einmælt samtykt at senda eitt bræv til bretsku stjórnina so skjótt sum gjørligt um viðurskiftini í Congo. Tað varð eisini samtykt, at sendast skuldi eitt kopi av brævinum til konsulin hjá Congo í Liverpool, Alfred Jones, sum er umrøddur fyrr sum handlangari hjá Leopold kongi.

Á fundi tann 23. februar 1904 varð greitt frá, at svar var komið frá Uttanríkisráðnum til fyrr umrødda bræv. Í hesum sambandi tók Guinnes á seg at hitta konsulin hjá Congo í London fyri at fáa enn betur greiðu á almenna politikkinum í Congo.

Málið viðvikjandi Dollanum verður umrøtt. Og tað var einmælt samtykt, nú hann hevði biðið um tað, at bíðað varð eftir ummæli frá økisnevndini í Congo, áðrenn hann sendi eina uppsøgn.

Tað varð eisini samtykt, at tað varð sent honum eitt bræv, har sagt varð frá, at tað er lítil vón um, at hann verður sendur aftur til Congo. Hann skuldi tí taka við møguligum øðrum starvi, sum hann kundi fáa í boði. Í meðan skuldi framhaldandi samskifti fara fram við økisnevndina í Congo.

Av áhuga kann her verða skoytt uppí, at nevndin við takksemi hoyrdi frágreiðing frá Guinnes um teir fundir, hann hevði skipað fyri í Skotlandi um viðurskiftini í Congo, og at tað hevur verið so stórur áhugi fyri hesum fundum. Hetta var eitt fundarvirksemi sum var byrjað av Dollanum.

Á fundi tann 22. mars 1904 verður eitt bræv lisið frá Armstromg um Danielsen og tað arbeiðið, hann hevur gjørt í maskindeildini, og her varð útsagnin endurtikin um hvussu óeftirfarandi tað var, sum hann segði. Hetta man vera meira smáligheit enn nakað annað.

Eftur at hava viðgjørt málið sera gjølla, var einmælt samtykt at bíða við endaligari støðutakan, inntil svar var komið frá økisnevndini uppá brævið frá Guinnnes.



*Hetta var útgerðin hjá hvíta manninum. Her høvdu tey innføddu ongan møguleika at verja seg*

## Trupulleikar um hann giftist

Fundur er 17. mai 1904, har sagt verður frá:

*”Tað var komið bræv frá Danielson, har hann strongdi á at fáa eitt endaligt svar um sína framtíð í missiónini. Hann greiddi eisini frá síni ætlan um at giftast í komandi viku. Eftir enn eina gjølla viðgerð varð samtykt, at eingin endalig avgerð kundi takast fyrr enn frætt var aftur úr Congo.*

*Men havandi í huga teir samstarvstrupulleikar, sum kundu væntast í maskindeildini, er tað mest sannlíkt, at hann ikki verður sendur aftur til Congo. Vísandi til ivan um hansara framtíð, kann nevndin ikki síggja nakran møguleika at góðkenna ætlaða giftarmálið. Tey føldu, at skuldi nevndin í Congo komið við ynski um, at hann skuldi avstað aftur, varð nóg góð tíð til at hugsa um eina trúloving.*

*Sjálvt um nevndin ikku kundi forbjóða giftarmálinum, føldi hon, at um tað varð framt, kundi hetta gera viðurskiftini enn truplari.”*

Orsøkin fyri hesum var helst tann, at Missiónin eisini skuldi góðkenna konurnar, sum fóru út við trúboðarunum, og í hesum førinum vistu teir ikki so frægt, sum hvør hon var. Men seinni royndir vístu tó, at henni var so einki galið við.

## Óynsktur av myndugleikunum í Congo

Á fundu 14. juni 2004 byrjar ein avkláring at nærkast. Tað verður sagt í fundarbókini:

*”Brøv vóru lisin frá limunum av Field Committe, økisnevndini í Congo. Hetta vóru svar uppá teir fyrispurningar sum eru settir hesi nevnd viðvíðjandi spurninginum, hvørt Danielson skuldi sendast aftur til missiónsmarkina.*

*Tað hevur verið avgjørt av ”council” at gera eina endaliga niðurstøðu nú heldur enn at bíða eftir einum endaligum fundi, serliga nú, ið Danielson legði trýst á at fáa eina endaliga niðurstøðu um sítt framtíðar samband við missiónina.*

*Hr Jackson mælti til, at havandi í huga hesar verunleikar:*

***1.** Meirilutin av nevndarlimunum í Field Committe eru ímóti, at hann kemur aftur.*

***2.** At lata hann koma aftur til Congo fer at føra til, at trupulleikarnir í maskindeildini fara at halda áfram.*

***3.** Hann er óynsktur av myndugleikunum í Congo.”*

Júst hetta punkt man hava komið væl við, tí hetta avgjørdi málið endaliga. Men hetta er eisini eitt gott eftirmæli at hava hjá Dollanum.

Á fundinum var eisini eitt evni, hvussu viðurskiftini á maskindeildini skuldu skipast, og hvussu Danielson kundi vera til hjálpar í so máta.



*Teir hvítu høvdu onga neyð. Hetta eru húsini hjá belgiska kommandantinum Gehot*



*Espen Wæhle er ein tann fremsti Congoserfrøðingur í Norðanlondum. Hann fegnast um, at Daniel J. Danielsen nú fær sítt rætta pláss í søguni um norðurlendingar í Congo*

Annars staðfesti Home Council, at burtursæð frá hansara sinni og samstarvstrupulleikum, so høvdu teir einki ímóti Danielson, og um tað var ynskt, vildu teir geva honum sítt viðmæli sum ein samvitskufullur arbeiðari, fyrsta floks mekanikari og ein álvarsamur kristin.

## Fer til Føroyar

Á fundi 12. juli 1904 verður eitt bræv lisið frá Danielson í sambandi við hansara uppsøgn. Eftir eina gjølla viðgerð varð samtykt at senda honum eitt bræv at spyrja hvørjar framtíðarætlanir, hann hevði, og sagt varð frá, at missiónin vildi gjalda honum fyri ferðina til Føroyar ella onkra aðra staðni í heiminum, har hann kundi finna arbeiði.

Tann 6. oktober 1904 er vist seinasti fundur, har Dollin er á fundarskránni hjá Congo Balolo Mission.

Brævi varð lisið frá Danielson, har hann greiddi nevndini frá sínum ætlanum at byrja virksemi í Føroyum, sum hann skuldi stuðla sær sjálvum at gera evangeliskt arbeiði millum sítt egna fólk, soleiðis sum møguleikarnir fóru at vísa seg. Hann greiddi frá, at kostnaðurin av at fara til Føryar var 10 pund, og nevndin samtykti einmælt at rinda hesa upphædd.

Hetta merkir sostatt, at tað er í oktober 1904, at Dollin kemur aftur til Føroya at virka eftir at hava verið í Føroyum ein stuttan túr á vári sama ár, har hann hevur víst ljósmyndir úr Congo.

### Næstu ferð

Í komandi parti verður serliga greitt frá samskiftinum millum Daniel J. Danielsen og Edmund Morel, eftir at Dollin er komin aftur til Bretlands. Her sæst, at Daniel er í fremstu røð í tí virksemi, sum fer fram fyri at verja fólkið í Congo móti yvirganginum hjá Leopold kongi.

Sosialurin